sev

Netroknskapur 2025

www.sev.fo

Innihaldsyvirlit



Leiðsluátekning	3
Átekning frá óheftum grannskoðara	4
Høvuðs- og lyklatøl	6
Leiðslufrágreiðing	7
Nýttur roknskaparháttur	22
Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember	27
Fíggjarstøða 31. desember	28
Peningastreymsuppgerð	30
Notur	31

Sev
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
sev@sev.fo
www.sev.fo

Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram netroknskapin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 hjá Elfelagnum Sev. Netroknskapurin er eisini ein partur av ársfrásøgnini hjá Elfelagnum Sev.

Netroknskapurin er gjørdur í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at netroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2025 og av úrslitinum av netvirkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 27. mars 2026

Stjórn

Hákun Djurhuus
Stjóri

Fíggjarleiðsla

Bogi Bendtsen
Deildarstjóri fyri fyrisiting

Nevnd

Haraldur S. Hammer
Formaður

Sylvia Thomsen
Næstforkvinna

Arni Teindal

Hans Kári Hansen

Heðin Mortensen

Tórbjørn Jacobsen

Winnie Kjærbo

Átekning frá óheftum grannskoðara

Til leiðsluna í Elfelagnum Sev

Vit hava grannskoðað netroknskapin, sum inniheldur upphæddir fyri rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreym og notur fyri Elfelagið Sev fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2025. Upphæddirnar í netroknskapinum eru partur av ársfrásøgnini fyri Elfelagið Sev fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2025, sum vit hava grannskoðað.

Tað er okkara fatan, at netroknskapurin fyri Elfelagið Sev fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2025 á øllum týðandi økjum er gjørdur í samsvar við tær roknskaparreglur, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

Grundarlag fyri niðurstøðuni
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða netroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, eisini hava vit hildið hinar etisku skyldurnar hjá okkum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Áherðsla á viðurskifti í netroknskapinum – nýttur roknskaparháttur
Vit skulu gera vart við upplýsingarnar í innganginum av hesari váttan, harav tað framgongur, at netroknskapurin er gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

Hesi viðurskifti hava ikki ávirkan á okkara niðurstøðu.

Ábyrgd leiðslunnar av netroknskapinum
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera netroknskapin samsvarandi teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at netroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða netroknskapin
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at netroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í netroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í netroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir

standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, hin 27. mars 2026

P/F JANUAR
løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá
Statsaut. revisor

Høvuðs- og lyklatøl 2021-2025

Upphæddir í t. DKK	2025	2024	2023	2022	2021
Rakstrarroknskapur					
Nettosøla	816.601	770.262	715.260	587.753	590.385
Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar	162.757	144.973	140.711	53.875	91.775
Rakstrarúrslit	83.568	76.750	75.719	-7.512	34.044
Fíggjarligir postar, netto	-50.706	-30.380	-23.890	17.258	-14.322
Ársúrslit	**-14.674**	**22.520**	**30.176**	**8.789**	**6.442**
Fíggjarstøða					
Fíggjarstøðujavni	2.459.135	2.385.348	2.016.897	2.122.635	1.693.457
Eginogn	**674.220**	**693.757**	**673.806**	**682.296**	**657.900**

Leiðslufrágreiðing

Leiðslufrágreiðing

Høvuðsvirksemið
Elfelagið Sev er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti at náttúru og umhvørvi.

Hesin roknskapur fyri netvirksemið hjá Sev er ein partur av samlaða roknskapinum hjá Sev. Frágreiðingin fevnir um netvirksemið, íroknað fyrisiting hjá felagnum í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember 2025.

Býti av avlopi í rakstri
Ársúrslitið fyri netpartin verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur, umframt eina eginfígging upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Fyri útgreining av framferðarhátti og útrokning av býti millum framleiðslu- og netpartin, verður víst til notu 1.

Eftir hetta skal framleiðsluparturin hava allan sín rakstrarkostnað rindaðan, íroknað kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur. Harumframt miðar

framleiðsluparturin eftir at hava eitt yvirskot svarandi til 5% av primoeginpeninginum.

Gongdin í virkseminum

Endurnýgging
Arbeiðið at endurnýggja, menna og víðka 10, 20 og 60 kV-netið heldur fram, og talan er um nógvar verkætlanir kring landið. Her kann nevnast fleiri strørri kaðalføringar, eitt nú uppí á Fossum í Klaksvík, innkomuvegur til Havnar, tunlarnar norður um fjall, kaðalføring av Sandi til Skálavíkar, Heimasandsvegurin, Hovstunnulin, umlegging av Vestmannalinjuni í Skálafirði og nýggja trafostøð inni á Mjølvirkinum í Fuglafirði. Harumframt eru hópin av smærri kaðalføringum og netarbeiðum eins og íløga er gjørd í nýggja kontrolrúmið. Elbilaøkið er í støðugum vøkstri og íløgur í fleiri nýggjar løðistøðir eru eisini gjørdar.

Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við myndugleikar, kommunur, Landsverk og Føroya Tele. Felagið hevur eisini í ár bygt fleiri nýggjar 10 og 20 kV trafostøðir kring landið.

Arbeiðið við nýggju koblingar- og battarístøðini á Sandoynni við synkronkompensatori gongur væl og verður væntandi liðugt við ársenda næsta ár. Somuleiðis er arbeiðið uppá koblingar- og battaríðstøðina í Skálafirði byrjað og væntandi verður arbeiðið liðugt í 2027.

Arbeiðið við nýggja synkronkompensatorinum Norðuri á Strond er liðugt og er hesin tikin í nýtslu.



“ Í 2025 vóru 12 feilir á háspenningskervinum, hetta er ein lækking frá undanfarna ári”

Viðlíkahald
Aftur í ár er viðlíkahaldsarbeiði farið fram á netinum, alt fyri at tryggja eina støðuga streymveiting til kundan.

Mynd 1 vísir eitt yvirlit yvir feilir seinastu mongu árini. Myndin vísir, hvussu talið á feilum er fækkað frá 1989 til 2025. Miðvísa viðlíkahaldsarbeiðið saman við endurnýggingini av elnetinum, er orsøkin til, at Sev í dag hevur munandi færri feilir á háspenningsnetinum.

Feilir á háspenningskervinum í 2025
Í 2025 vóru 12 feilir á háspenningskervinum, hetta er ein lækking frá undanfarna ári. Mynd 2 vísir, hvørjir feilir hava verið, og hvar í skipanini teir vóru.

Mynd 1



Mynd 2





Gongdin í fíggjarligu viðurskiftunum

Úrslitið
Samlaða úrslitið fyri netpartin, uppgjørt sum móður-felag, gjørdist eitt hall upp á 14,7 mió. kr. í 2025 móti 22,5 mió. kr. í avlopi í 2024.

Ein beinleiðis samanlegging av hesum roknskapinum fyri netið við roknskapinum fyri framleiðsluna gevur ikki samtaksúrslitið. Hetta er tí, at netroknskapurin er uppgjørdur sum móðurfelag, meðan framleiðslu-roknskapurin eru uppgjørdur sum samtak.

Víst verður til brotið “Virkisbýti” í samtaksroknskapinum, har úrslitini fyri netið og framleiðsluna síggjast uppgjørd bæði sum samtak og sum móðurfelag.

Inntøkur
Tað eru tríggir tættir, ið ávirka høvuðsinntøkuna hjá Sev. Hesir tríggir tættir eru elprísbroyting, broyting í elnýtsluni, og forskjóting ímillum ymiskar kundaprísbólkar.

Inntøkurnar hjá netpartinum stava frá sølu av elmegi til vinnuligar, privatar og almennar kundar, herundir kommunur. Harumframt stava inntøkurnar frá føstum gjøldum, íbindingargjøldum og øðrum ómaksgjøldum frá somu kundum og annað.

Felagið framdi onga elprísbroyting fyri 2025.

Nettosølan
Í ár vórðu 460,1 GWt avroknaðir mótvegis kundum felagsins móti 435,5 GWt undanfarna ár, og er hetta

Talva 1

Kundabólkar í GWt

	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024	2025	Broyting 24-25 GWt	Broyting 24-25 %
Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna	37,9	42,1	56,8	70,6	83,9	89,5	94,4	106,0	119,0	133,8	14,8	12,4
Gerð, framleiðsla og byggivirksemi	73,9	85,5	82,2	95,1	96,5	101,0	101,2	98,4	90,5	90,3	-0,2	-0,2
Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi	24,4	24,4	24,9	25,1	25,0	26,9	27,3	27,9	28,7	29,7	1,0	3,5
Flutningur, postur og fjarskifti	25,6	24,3	24,3	24,3	23,6	22,7	22,9	23,0	22,4	22,9	0,5	2,4
Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur	3,9	3,6	3,7	3,7	3,5	3,6	3,6	3,5	3,6	3,4	-0,2	-6,3
Almennar og privatar tænastur, kirkur, samkomur	40,5	41,5	42,1	44,1	45,5	49,4	50,6	52,8	53,3	56,7	3,4	6,3
Gøtuljós	7,0	6,7	6,6	6,4	6,2	5,9	5,6	5,3	5,1	4,8	-0,3	-5,6
Sethús, íbúðir, summarhús og neyst	78,1	78,2	79,9	81,2	86,2	88,5	89,7	98,7	112,9	118,5	5,5	4,9
Tilsamans avroknað	**291,4**	**306,3**	**320,5**	**350,4**	**370,4**	**387,6**	**395,3**	**415,6**	**435,5**	**460,1**	**24,5**	**5,6**
Árlig broyting í %	**1,2**	**5,2**	**4,6**	**9,3**	**5,7**	**4,6**	**2,0**	**5,1**	**4,8**	**5,6**		

met. Vøksturin í ár var 5,6% í mun til 4,8% undanfarna ár. Talan er soleiðis um ein stóran vøkstur í søluni í ár eins og undanfarna ár.

Inntøkan frá kWt-søluni og føstu gjøldunum í 2025 er 788,9 mió. kr. móti 748,9 mió. kr. árið fyri, og henda stavar serstakliga frá eini øking í søluni til kundar innan aling. Eisini sølan til almennar og privatar tænastur, kirkjur, samkomur, umframt at sølan til privatkundarnar er økt. Inntøkurnar frá íbindingargjøldunum eru 29,0 mió. kr. móti 18,1 mió. kr., sum er 10,9 mió. kr. hægri enn undanfarna árið. Inntøkan frá føstu gjøldunum er økt við 1,7 mió. kr. í mun til undanfarna ár.

Sundurgreining av søluni í kundabólkar
Talva 1 vísir avroknaðu elsøluna í GWt til kundar felagsins. Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan søluna í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

Vaksandi elsøla
Í fleiri ár á rað er inntøkan vaksin, næstan uttan undantak orsakað vaksandi elnýtslu. Árliga broytingin í elnýtsluni sæst í talvu 1.

Sum talva 2 fyri avroknaðu elsøluna vísir, so er stór framgongd í elsøluni til "Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna". Framgongdin í hesum bólkinum hongur saman við góðu gongdini hjá alivinnuni seinastu árini, og stórar útbyggingar hjá hesum kundum viðførir ein øktan tørv eftir elmegi. Elsølan til "Gerð, framleiðsla og byggivirksemi," er á sama støði sum undanfarna ár.

Framgongd er í elsøluni til "Almennar og privatar tænastur, kirkjur, samkomur," og í søluni til "Sethús, íbúðir, summarhús og neyst." Ein av orsøkunum er økt søla í sambandi við orkuskiftið.

Samlað er sølan økt við 5,6% í 2025 samanborið við 4,8% í 2024. Í miðal seinastu fimm árini hevur árligi vøksturin verið 4,4% móti einum árligum miðal vøkstri uppá 5,2% árini 2016-2020. Í miðal seinastu 10 árini eru avroknaðir

“ Samlað er sølan økt við 5,6% í 2025 samanborið við 4,8% í 2024”

Talva 2

Inntøkur streymsøla og fast gjald frá kundabólkum í mió. kr.

	2025	2024	Broyting 25-24 mió. kr.	Broyting 25-24 %
Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna	217,2	194,0	23,2	11,9
Gerð, framleiðsla og byggivirksemi	150,8	152,0	-1,2	-0,8
Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi	51,9	50,3	1,6	3,2
Flutningur, postur og fjarskifti	39,6	38,7	0,8	2,2
Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur	5,7	6,2	-0,5	-7,8
Almennar og privatar tænastur, kirkjur, samkomur	99,1	92,7	6,4	6,9
Gøtuljós	8,8	9,3	-0,5	-5,4
Sethús, íbúðir, summarhús og neyst	215,6	205,5	10,1	4,9
Tilsamans avroknað	**788,9**	**748,9**	**40,0**	**5,3**

373 GWt árliga til kundar felagsins. Síðani 2021, tá avroknað var 387,6 GWt til kundar felagis, so er avroknað 460,1 GWt í 2025, ella 72,5 GWt meiri. Talan er um ein vøkstur uppá 18,7%. So talan er um sera stóran vøkstur í søluni seinastu árini til kundar felagsins.

Inntøkuvøksturin stavar frá øllum kundabólkum, grundað á hægri kWt-sølu til serliga kundar í bólkunum “Landbúnaður, aling, fiski-vinna og ráevnisvinna” saman við “Almennar og privatar tænastur, kirkjur, samkomur”, og “Sethús, íbúðir, summarhús og neyst”, meðan sølan til kundar í bólkinum “gerð, framleiðsla og byggivirksemi” er á sama støði sum undanfarna ár, sí talvu 2.

Inntøkan frá íbindingargjøldunum fyri 2025 er hægri enn undanfarna ár við 29,0 mió. kr. móti 18,1 mió. kr. í 2024. Samanlagt eru inntøkurnar øktar við 46,3 mió. kr., svarandi til 6,0%.

Sølan sundurgreinað á privatar kundar á oyggjar
Talva 3 vísir nýtsluna fyri privatar kundar býtt sundur á oyggjar.

Sambært talvu 3 hava kundar í Eysturoy hægstu miðalnýtsluna, meðan kundar í Streymoynni hava eina miðalnýtslu upp á 4.871 kWt. Miðalnýtslan fyri allar oyggjar er 4.986 kWt í 2025 móti 4.766 kWt í 2024. Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan søluna í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

Útreiðslur

Útreiðslur til keyp av elframleiðslu, skipanarberandi tænastum
Útreiðslurnar í 2025 til keyp av elframleiðslu vóru 433,0 mió.kr. og skipanarberandi tænastum 142,9 mió.kr.

Talva 3

Nýtsla fyri privatkundar eftir oyggjum

	kWt pr. oyggj 2025	kWt pr. oyggj 2024	kWt pr. oyggj 2023	Kundar 2025	Kundar 2024	Kundar 2023	Miðalnýtsla hvør kundi 2025	Miðalnýtsla hvør kundi 2024	Miðalnýtsla hvør kundi 2023
Borðoy	11.906.857	11.596.530	8.216.218	2.231	2.234	2.173	5.337	5.191	3.781
Eysturoy	27.690.953	26.305.447	18.711.033	4.817	4.772	4.606	5.749	5.512	4.062
Fugloy	45.951	40.070	33.638	13	13	14	3.535	3.082	2.403
Hestur	69.922	70.866	59.093	26	27	27	2.689	2.625	2.189
Kalsoy	190.060	177.951	165.358	87	88	86	2.185	2.022	1.923
Koltur	10.439	9.846	8.637	2	2	2	5.220	4.923	4.319
Kunoy	340.723	339.052	243.906	70	77	74	4.867	4.403	3.296
Mykines	58.301	58.738	61.454	46	44	42	1.267	1.335	1.463
Nólsoy	485.356	498.589	382.632	140	139	139	3.467	3.587	2.753
Sandoy	3.167.779	2.810.843	2.156.488	751	738	708	4.218	3.809	3.046
Skúvoy	73.896	78.662	79.909	42	42	41	1.759	1.873	1.949
Streymoy	53.999.056	51.393.379	36.176.025	11.086	11.052	10.827	4.871	4.650	3.341
Suðuroy	9.112.234	8.890.979	6.891.971	2.300	2.311	2.302	3.962	3.847	2.994
Svínoy	45.356	51.036	50.006	27	23	24	1.680	2.219	2.084
Vágoy	7.723.354	7.288.075	5.361.729	1.442	1.460	1.443	5.356	4.992	3.716
Viðoy	1.315.589	1.256.573	908.111	234	239	239	5.622	5.258	3.800
Tilsamans	**116.235.826**	**110.866.636**	**79.506.208**	**23.314**	**23.261**	**22.747**	**4.986**	**4.766**	**3.495**

Stýring av elskipanini og skipanarberandi tænastur
Í samlaðu útreiðslunum hjá verkunum er íroknað kostnaðurin av at framleiða elmegi, kostnaðurin fyri stýring av elskipanini, og kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur.

Kostnaðurin tilsamans kann sundurgreinast í kostnaðin fyri tilrættislegging og stýring av tøka máttinum, rullandi máttinum, reaktiva máttinum, spenningsregulering og frekvensregulering. Framleiðsluverkini selja sína framleiðslu av elmegi til netvirksemið, sum rindar fyri keypið, umframt kostnaðin fyri tí partinum av skipanarberandi tænastum, sum verkini standa fyri.

Felagið hevur arbeitt við at endurskoða kostnaðirnar fyri stýring av elskipanini og skipanarberandi tænastur. Úrslitið av arbeiðinum vísir, at hesir kostnaðir eru hægri enn kostnaðirnir, sum felagið vanliga hevur innroknað í roknskapin seinastu árini. Frá 2023 eru hesir kostnaðir innroknaðir eftir nýggjum leisti.

Kostnaður fyri stýring av elskipanini
Stýringin av elskipanini í Suðuroynni fer fram í Kontrollrúminum á framleiðsluverkinum í Vági, meðan

stýringin av elskipanini í meginøkinum fer fram í Kontrollrúminum fyri meginøkið.
Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum á meginøkinum upp á 11,5 mió. kr., er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri tilfar, lønir og avskrivingar á Kontrollrúminum fyri meginøkið. Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy er 2,3 mió. Kr. Samlaði kostnaðurin fyri netumsitingina er soleiðis 13,8 mió. kr.

Kostnaður fyri skipanarberandi tænastur
Í samstarvi við ráðgevingarfyritøkuna Deloitte í Danmark hevur Sev í 2021 gjørt skipan fyri at áseta kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur. Analysugrundarlagið vóru tøl frá 2019 og 2020. Niðurstøðan var, at talan var um ein kostnað fyri skipanarberandi tænasturnar uppá 0,26 kr. pr. seldan kWt. Hesin kostnaður vil broytast, so hvørt sum kostnaðir og seldir kWt broytast. Við støði í skipanini frá Deloitte er kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur fyri 2025 uppgjørdur til 0,36 kr. pr. seldan kWt og fyri 2024 er hesin uppgjørdur til 0,38 kr pr. seldan kWt. So talan er um sama støði sum undanfarna ár.

Samlaður kostnaður fyri stýring av elskipanini og skipanarberandi tænastur
Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur á termisku og vatnorkuverkunum er 136,7 mió. kr., og á øðrum smáverkum 6,2 mió. kr., so samanlagt er kostnaðurin frá framleiðsluni 142,9 mió. kr. Harafturat kemur kostnaðurin fyri stýring av elskipanini í Føroyum upp á 13,8 mió. kr. og kostnaðurin fyri stabilisering frá netpartinum upp á 8,2 mió. kr.

Samlaði kostnaðurin í 2025 fyri stýring av elnetinum og skipanarberandi tænastur er 164,9 mió. kr. móti 164,7 mió. kr. í 2024.

Rakstrarførdar lønarútreiðslur hægri
Nógv virkisøkir eru í felagnum, og Sev fylgir teimum almennu sáttmálunum, sum eru galdandi á teimum ymisku økjunum. Samlaðu lønarútreiðslurnar í 2025 vóru 62,9 mió. kr. móti 61,7 mió. kr. í 2024 íroknað fyrisiting, svarandi til eina hægri nýtslu upp á 1,2 mió. kr.

Lønarútreiðslurnar fyri netvirksemið vóru 40,1 mió. kr. í 2025 móti 39,0 mió. kr. í 2024, ella ein hægri nýtsla upp á 1,1 mió. kr., meðan lønarútreiðslurnar til fyrisitingina vóru 22,9 mió. kr. í 2025 móti 22,8 mió. kr. í 2024, svarandi til eina hægri nýtslu upp á 0,1 mió. kr.

Tilfars- og tænastuveitingar hægri
Útreiðslurnar til tilfars- og tænastuveitingar í 2025 vóru 42,3 mió. kr. móti 44,5 mió. kr. í 2024, ella ein lægri nýtsla uppá 2,2 mió.kr. Kostnaðurin kann sundurgreinast í netvirksemi og fyrisiting.

Netvirksemið
Útreiðslur til tilfars- og tænastuveitingar til netvirksemið í 2024 vóru 20,2 mió. kr. móti 20,1 mió. kr. í 2024, svarandi til eina hægri nýtslu upp á 0,1 mió. kr. grundað á nýtslu hjá rakstrardeildum felagsins.

Fyrisiting
Útreiðslur til tilfars- og tænastuveitingar til fyrisiting í 2025 vóru 22,1 mió. kr. móti 24,4 mió. kr. í 2024, og eru hesar sostatt 2,3 mió. kr. lægri.

Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan kostnaðin fyri tilfars- og tænastuveitingar í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

Fíggjarkostnaður
Fíggjarkostnaðurin er ávirkaður av javning av teimum fíggjarligu amboðunum.

Fíggjarkostnaðurin var 50,7 mió. kr. í 2025 móti 30,4 mió. kr. í 2024, svarandi til ein hægri fíggjarkostnað upp á 20,3 mió. kr., sí sundurgreining av kostnaðinum í notu 6. Í samlaða talinum eru íroknaðar kapitalútreiðslur upp á 39,1 mió. kr. frá dótturfeløgum.

Í løtuni hevur felagið eina samlaða langfreistaða bruttoskuld upp á 2.025,5 mió. kr. við fastari rentu stavandi frá lánsbrøvum við fastari rentu og rentu-umbýtingaravtalum fyri einum parti av bankaskuldini. Nærri lýsing av fíggjarkostnaðinum er at finna í samtaks-roknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

Av- og niðurskrivingar
Av- og niðurskrivingarnar fyri 2025 vóru 79,2 mió. kr. móti 68,2 mió. kr. í 2024, harav 71,3 mió. kr. stava frá netvirkseminum og 7,9 mió. kr. frá fyrisitingini.

Íløgur
Íløgur í koblingsstøðir og net eru fyri tilsamans 306,7 mió. kr. í 2025 í mun til 205,8 mió. kr. í 2024, sum talva 4 vísir.

Tilgongd frá arbeiði í gerð og beinleiðis bókað til støðisogn (avskrivingargrundarlagið), eru víst í talvu 7. Víst verður til arbeiði í gerð og til notu 8 í roknskapinum.

“ Íløgur í koblingsstøðir og net eru fyri tilsamans 306,7 mió. kr. í 2025 í mun til 205,8 mió. kr. í 2024”

Stórar íløgur innan net, koblingsstøðir, bygningar og annað innan netið eru gjørdar seinastu árini og í 2025, eins og stórar íløgur standa fyri framman. Serliga er talan um, at netið er styrkt og skal framhaldandi styrkjast, fyri at gera Sev ført fyri at taka ímóti meiri vindorku og veita tann streym, sum kundar felagsins hava tørv á.

Nógvar íløgur eru gjørdar seinastu árini í nýggjar koblingsstøðir, og 2025 er einki undantak. Talan er um støðir, sum eru týdningarmiklar fyri at kunna føra elorku fram til einstøku økini kring landið. Samanlagt eru íløgur í koblingsstøðir gjørdar fyri 175,5 mió. kr., meðan íløgur í net v.m. eru 113,2 mió. kr.

Royndirnar við koblingsstøðini við battarístøð og synkronkompensatori í Porkeri hava verið sera góðar og Suðuroyggin er í stóran mun vorðin “grønari”. Henda skipanin er ført víðari til meginøkið, har battarístøðin við

Talva 4

Íløgur, mió. kr.

	2025	2024
Koplingarstøðir	175,5	62,9
Net	113,2	107,1
Fyrisitingarbygningur, amboð, KT-útgerð	18,0	35,8
Tilsaman	**306,7**	**205,8**

Talva 5

Íløgur, mió. kr.

	2025	2024
Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð	267,2	187,4
Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd	39,6	18,3
Íløgur við ársenda	**306,7**	**205,8**

Talva 6

Arbeiði í gerð, mió. kr.

	2025	2024
Salda við ársbyrjan	217,3	120,3
Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð	267,2	187,4
Arbeiðir ført til avskrivingar sum tilgongd	**-82,0**	**-90,3**
Salda við ársenda	402,6	217,3
Broyting í arbeiði í gerð	**185,2**	**97,1**

synkronkompensatori á Sundi bleiv tikin í nýtslu í desember 2023. Royndirnar av hesi støð hava verið góðar, og tí er avgjørt at útbyggja støðina á Sundi og væntandi stendur henda útbygging liðug við endan av 2026.

Tann útbygda battarístøðin á Sundi skal stuðla upp undir at sum mest av orkuni frá vindmyllulundunum í Hoyvíkshaganum, Neshaga, Flatnahaga, Vestmanna og í Húsahaganum fæst til høldar. Nýggja battarístøðin á Sandi skal eisini stuðla undir vindorkuframleiðsluni í meginøkinum og serliga eisini nýggju ætlaðu vindmyllulundini í Klivaløkshaga á Sandi. Umframt íløgurnar í koblingsstøðirnar eru stórar íløgur gjørdar í kaðalleggingar, serliga í sambandi við dagføring av tunnlum.

Víst verður annars til nærri umrøðu um íløgurnar í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

Gjaldførið
Gjaldførið er ikki skilt sundur millum framleiðslu og net, og verða millumrokningar millum partarnar nýttar. Alt virksemið hjá framleiðsluverkunum verður fíggjað av netpartinum, sum tryggjar verkunum neyðugt gjaldføri. Sama er galdandi fyri vindfeløgini, sum eisini verða fíggjað av netpartinum.

Tøkur peningur felagsins við ársenda er 244,1 mió. kr. móti 375,7 mió. kr. undanfarna ár.

Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peningastovnum upp á tilsamans 850 mió. kr. at nýta til íløgur og gjaldføri. Sostatt er tøki

Talva 7

Tilgongd til støðisogn, mió. kr.

	2025	2024
Arbeiði ført til avskrivingar sum tilgongd	82,0	90,3
Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd á støðisogn	39,6	18,3
Tilgongd við ársenda	**121,5**	**108,7**

Talva 8

Størstu íløgurnar í koplingarstøðir og net, mió. kr.

	2025
Koblingsstøð Sund, víðkan av battarískipanini	45,6
Battarískipan á Sandi	43,3
Koblingsstøð Sandoy, nýggj 60kV støð á Sandi	33,5
Sandur, Heimasandsvegur, 60 og 20kV kaðallegging	10,6
Synkronkompensator á Sandi	10,4
Sandur - Skálavík, Sandarlíð, 60 og 20kV kaðallegging	10,1
Hovstunnilin, 20 og 10kV kaðallegging	9,1
Koblingsstøð Skálabotnur, Battarískipan	9,0
Koblingsstøð Skálabotnur, Nýggj 60kV støð	8,3
Koblingsstøð Sandoy, íbindingarstað vindmyllulund Klivaløkshagi	7,9
Tilsaman	**187,8**

> “ Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 1.094,1 mió. kr.”

Talva 9

Størstu tilgongdirnar til avskriving, mió. kr.

	2025
Synkronkompensator á Strond	22,6
Sandur, Heimasandsvegur, 60 og 20kV kaðallegging	17,2
Fjøruvegur - Glyvradalur, 20kV kaðallegging	4,3
Kontrollrúm meginøkið, innrættan av nýggjum kontrollrúmi	4,1
Rakstrardeild, MET mastur Eiði	3,2
Tilsaman	**51,4**

peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 1.094,1 mió. kr. móti 1.225,7 mió. kr. undanfarna ár.

Neyðugt er at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum, eins og tað verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikum á fíggjarmarknaðunum.

Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri soleiðis, at Sev altíð er ført fyri at rinda kontant fyri eitt oljukeyp og kostnaðin av einum óhappi á einum av framleiðsluverkunum, ella á netinum. Harumframt er neyðugt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin hjá framleiðsluverkunum og á netpartinum. Nærri lýsing av gjaldførinum er í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

Váðaviðurskifti

Váðaviðurskifti hjá felagnum kunnu greinast í ymiskar bólkar: Nærri lýsing av váðaviðurskiftunum er at finna í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

Útlit fyri rakstrarárið 2026

Úrslitið áðrenn skatt fyri 2026 er eitt ætlað yvirskot umleið 35 mió. kr. við støði í fyriliggjandi ætlan fyri 2025 og eftir meting av býtinum av úrslitinum í mun til eginpeningskravið.

Gongdin við høgum, men tó lækkandi, rentum, høgum brúkaraprísum og høgum kostnaði fyri brennievni til hitan av húsum og flutning ávirkar nýtsluna hjá kundum, men grøna orkuskiftið vísir seg tó at føra eina hækkandi elnýtslu innan grøna partin við sær, har Sev væntandi kemur at selja 59,3 Gwt. Umframt søluna til tann grøna málaran er “vanliga sølan” til teir privatu kundarnar ætlað við eini framgongd uppá 2,0%.

Kundabólkurin fyri aling v.m. hevur ein ætlaðan vøkstur uppá 4%. Hinvegin verður roknað við, at sølan til serliga framleiðsukundarnar, har tann stóri parturin er innan pelagisku vinnuna, fellur í mun til undanfarna ár, tí kvoturnar minka. Roknað verður við eini afturgongd fyri



gøtuljós. Fyri aðrar kundabólkar er roknað við eini framgongd uppá 2%.
Við støði í søluni fyri 2024 og partvíst í 2025, er ætlað við eini sølu í 2026 upp á 486,3 GWt. Samlaða inntøkan er ætlað til 892,7 mió. kr., her íroknað fast gjald og íbindingargjald v.m.

Sev hevur stovnað sjálvstøðug dótturfeløg at umsita vindmyllulundirnar í ávikavist Neshaga, Porkeri og Húsahaga. Í móðurfelagsroknskapinum viðførir hetta, at keyp av vindorku er innroknað, samstundis sum kostnaður av tilfari og lønum, avskrivingum og rentum er tikin við. Úrslitið frá dótturfeløgum verður tikið inn í roknskapin gjøgnum úrslit av kapitalpørtum. Samlaða úrslitið hjá Sev ávirkast ikki, tá talan er um samtaksroknskapin. Harumframt kemur Sev at keypa elmegi frá øðrum veitarum.

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar at verða 114,7 mió. kr. í 2026 móti 105,2 mió. kr. í 2025, svarandi til ein hægri kostnað uppá 9,5 mió.kr.

Ætlað er við av- og niðurskrivingum upp á 103,2 mió. kr. og fíggjarkostnaði upp á 45,3 mió. kr. Av- og niðurskrivingar og fíggjarkostnaður økjast grundað á íløgurnar felagið ger og lántøku fyri at fíggja hesar.

Við einum mettum yvirskoti í 2026, sum samanumtikið er nøktandi tá inntøku- og kostnaðarbýtið er framt, luttekur raksturin fyri netpartin við einari eginfígging til íløgur. Tað er neyðugt at hava eitt nøktandi úrslit, og harvið eina nøktandi eginfígging frá rakstrinum, sum skal vera við til at fíggja komandi íløgur í koblingsstøðir og

viðlíkahald av verandi neti, eins og íløgur í menningini av netinum skal gerast, fyri at taka ímóti alsamt vaksandi partinum av elmegi frá varandi orkukeldum, og veita hesa víðari til viðskiftafólk felagsins.

Sev hevur seinastu árini býtt inntøkur millum net- og framleiðsluvirksemið eftir regluni um, at netvirksemið skal hvíla í sær sjálvum. Broytingar frá 2024 í Elveitingarlógini gera, at tað er neyðugt at endurskoða háttalagið í inntøkubýtinum. Elveitingareftirlitið og Sev fara í 2026 at arbeiða fram í móti at koma ásamt um, hvussu framleiðslueindir, sum nú eru umfataðar av hvíla í sær sjálvum hugtakinum, skulu avroknast í inntøkubýtinum. Nærri lýsing av 2026 sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2026 á www.sev.fo.

Hendingar eftir roknskaparlok
Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

sev

Netroknskapur 2025

www.sev.fo

Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Elfelagið Sev er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Netroknskapurin er gjørdur upp sum ein samtaksroknskapur uttan útjavnan av innanhýsis bókingum í rakstri og javna. Hetta fyri at geva lesaranum so góða kunning sum gjørligt um alt netvirksemi hjá Sev-samtakinum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørdur í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m., verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaðu samanburðartølini í talvuni.

Alment um innrokning og virðisáseting
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

Umrokning av fremmandum gjaldoyra
Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.
Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

Rakstrarroknskapurin

Nettosøla
Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

Vørunýtsla
Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

Aðrir uttanhýsis kostnaðir
Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyrisitingarkostnað.

Skipanarberandi tænastur
Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum kemur av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi, umframt kostnaðin fyri veitan av skipanarberandi tænastum. Skipanarberandi tænastur umfata tilrættislegging og stýring av tøkum mátti, rullandi mátti, reaktivum mátti, spenningsregulering og frekvensregulering.

Íkastið til kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur kring landið annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkunum.

Stýring av elskipanini
Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri tilfar, lønir og avskrivingar á Kontrollrúminum við Landavegin í Tórshavn. Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í Suðuroy verður gjørdur upp grundað á lønirnar á Vágsverkinum.

Býti av inntøkum
Sambært elveitingarlógini skal virksemið hjá Sev fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggast við lántøku. Sev hevur upprunaliga mett, at ein eginfígging upp á 25% er nøktandi, og hevur í roknskapunum fyri 2016-2020 tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin. Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin. Hetta er grundað á at felagið higartil hevur havt ein høgan eginpeningspart.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin fyri eitt 5-ára tíðarskeið, sum er inniverandi ár og næstu 4 árini. Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur, netparturin hevur umframt eina eginfígging í løtuni upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Um samlaða úrslitið fyri samtakið er størri enn úrslitið fyri netpartin, verður hesin partur av úrslitinum fluttur til framleiðslupartin.

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo eginognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkredittlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

Starvsfólkakostnaðir
Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

Av- og niðurskrivingar
Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

Fíggjarpostar
Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrar-roknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Órealiseraður rentukostnaður í samband við prístrygging.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýti verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum feløgum
Í rakstrarroknskapi móðurfelagsins verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýtta felagnum innroknaður eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi.

Fíggjarstøðan

Materiell støðisogn
Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

	Brúkstíð ár	Restvirði
Framleiðsluvirkir	10-50	0%
Bygningar	50	0%
Rakstrargøgn	3-5	0%

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

Niðurskriving av støðisogn
Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

Fíggjarlig støðisogn

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum
Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Vørugoymslur
Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFOháttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

Áogn
Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

Tíðaravmarkingar
Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

Tøkur peningur
Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, ið hava eina lánitíð undir 3 mánaðir, og sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

Partafelagsskattur og útsettur skattur
Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

Aðrar avsettar skyldur
Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap upp á arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

Avleidd fíggjarlig amboð
Felagið nýtir avleidd fíggjarlig amboð til at tryggja gjaldoyraváða, oljuprísváða og rentuváða.

Avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsprís, og beinleiðis transaktiónskostnaðir verða innroknaðir í raksturin. Aftaná upprunaligu innrokningina verða avleidd fíggjarlig amboð innroknað til dagsprís, og broytingar í virðinum verða innroknaðar sum greitt frá í tí fylgjandi. Felagið hevur ikki handilslig avleidd fíggjarlig amboð.

Handilslig avleidd fíggjarlig amboð verða roknað sum stuttfreistað ogn ella skuld. Dagsvirði av einari trygging verður roknað sum langfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er longri enn 12 mánaðir og, sum stuttfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er styttri enn 12 mánaðir.

Gjaldføristrygging
Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

Skuld
Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirðið, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður

virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.
Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

Peningastreymsuppgerð
Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í peningastreymum og tøkan pening við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnan skatt.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postunum.

Peningastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdráttir av langfreistaðari skuld, umframt trekk upp á kassakredittir.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.

Rakstrarroknskapur

1. januar – 31. desember

Upphæddir í t.DKK

Nota		2025	2024
1	Nettosøla	816.601	770.262
	Keyp av streymi	-360.572	-316.655
2	Keyp av vind, biogass- og sjóvarfalsorku	-58.199	-63.094
	Søla av streymi til framleiðslu hjá Sev (eginnýtsla)	15.443	15.824
	Netumsiting	-2.300	-2.300
	Skipanarberandi tænastur	-142.927	-152.790
3	Oljuútreiðslur	-52	-2
4	Tilfars- og tænastuveitingar	-42.310	-44.543
	Bruttovinningur	225.684	206.703
5	Starvsfólkakostnaðir	-62.928	-61.731
	Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar	162.757	144.973
	Av- og niðurskrivingar av materiellari støðisogn	-79.188	-68.223
	Úrslit áðrenn fíggjarpostar	83.568	76.750
9	Inntøkur frá kapitalpørtum í dótturfeløgum	-39.133	-8.567
10	Inntøkur frá kapitalpørtum í assosieraðum felag	1.864	-971
6	Fíggjarútreiðslur	-50.706	-30.380
	Úrslit áðrenn skatt	-4.407	36.832
7	Skattur av ársúrsliti	-10.268	-14.312
	Ársúrslit	**-14.674**	**22.520**
	Uppskot til býti av ársúrsliti:		
	Flutt úrslit	24.459	31.087
	Tiltaksgrunnur fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum	-39.133	-8.567
	Til nýtslu	**-14.674**	**22.520**

Fíggjarstøða, ogn

31. desember

Ogn í t.DKK

Nota		2025	2024
	Støðisogn		
8, 20	Býtisvirkir	1.150.578	1.112.586
	Bygningar og jarðarøkir	114.219	109.731
	Rakstrargøgn	60.993	57.876
	Íløguarbeiði í gerð	402.564	217.347
	Materiell støðisogn tilsamans	**1.728.354**	**1.497.540**
9	Kapitalpartar í atknýttum virkjum	28.974	38.595
10	Kapitalpartar í assosieraðum virki	42.243	40.378
11	Lán veitt dótturfeløgum	41.694	75.078
12	Avleidd fíggjarlig amboð	66.689	96.795
	Fíggjarlig støðisogn tilsamans	179.600	250.846
	Støðisogn tilsamans	**1.907.954**	**1.748.386**
	Ogn í umferð		
	Tilfar	47.926	35.791
	Vørugoymslur tilsamans	**47.926**	**35.791**
13	Vøru- og tænastuáogn	186.883	181.373
	Millumrokning framleiðsla	16.635	20.696
	Tíðaravmarkingar	55.834	23.394
	Áogn tilsamans	259.352	225.463
	Tøkur peningur	243.904	375.708
	Ogn í umferð tilsamans	551.181	636.962
	Ogn tilsamans	**2.459.135**	**2.385.348**

Fíggjarstøða, skyldur

31. desember

Skyldur í t.DKK

Nota		2025	2024
	Eginogn		
14	Innskot	4.140	4.140
	Grunnur til avleidd fíggjaramboð	-16.688	-11.826
	Grunnur til uppskriving eftir innaravirðishátti	0	14.224
	Flutt úrslit	686.768	687.219
	Eginogn tilsamans	**674.220**	**693.757**
	Avsettar skyldur		
	Avsett til eftirløn og líknandi skyldur	11.642	12.783
	Útsettur skattur	64.511	69.368
	Avsettar skyldur tilsamans	**76.152**	**82.151**
	Skuld		
15	Skuld til peningastovnar	901.925	1.252.891
	Langfreistað skuld tilsamans	**901.925**	**1.252.891**
15	Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld	299.642	3.784
	Tíðaravmarkingar	732	598
	Vøru- og tænastuskuld	0	21.596
	Millumrokning framleiðsla	383.019	229.568
12	Avleidd fíggjarlig amboð	83.213	29.292
	Onnur skuld	40.231	71.711
	Stuttfreistað skuld tilsamans	806.837	356.550
	Skuld tilsamans	1.708.763	1.609.440
	Skyldur tilsamans	**2.459.135**	**2.385.348**
16	Netúrslit á økir		
17	Netyvirlit		
18	Veðsetingar og aðrar skyldur		

Peningastreyms-uppgerð

Peningastreymsuppgerð			
Nota	Upphæddir í t.DKK	**2025**	**2024**
	Ársúrslit	-14.674	22.520
19	Reguleringar	177.431	122.453
	Broyting í rakstrarpeningi:		
	Vørugoymslur	-12.134	17.266
	Áogn	-24.398	-29.353
	Vøru- og tænastuskuld	-36.088	6.195
	Millumrokning framleiðsla	111.850	-28.261
	Onnur rakstrarskuld	-2.197	59.831
	Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar	199.789	170.652
	Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaðir	-50.706	-30.380
	Javning fyri swap o.a. reguleringar í rentuútreiðslum	9.355	-1.640
	Peningastreymar frá rakstrinum	158.438	138.632
	Keyp av materiellari støðisogn	-124.785	-110.170
	Broyting arbeiði í gerð	-185.217	-97.091
	Kapitalinnskot í dótturfelag	7.757	0
	Peningastreymar frá íløgum	-302.246	-207.261
	Lántøka netto	-296.441	251.082
	Tíðaravmarking av lánirentu	295.858	-314
	Goldnir avdráttir frá framleiðslu	12.588	12.316
	Peningastreymar frá fígging	12.004	263.085
	Samlaðir peningastreymar í árinum	-131.804	194.455
	Tøkur peningur við ársbyrjan	375.708	181.252
	Tøkur peningur við árslok	243.904	375.708
	Loyvt trekk á kassakreditt	850.000	850.000
	Tilsamans	**1.093.904**	**1.225.708**

sev

Notur

Netroknskapur 2025

Nota 1

Býti av avlop í rakstri

Í 2011 fór Sev undir at gera sjálvstøðugar roknskapir fyri framleiðslu- og netpartarnar. Í hesum sambandi hevur felagið tikið hædd fyri at rokna vinning í framleiðslupartinum á sama hátt, sum kravt er í sambandi við vindorkuútboðini. Innrokningin av vinningi er fyri at geva eina rættvísandi mynd av rakstrinum hjá framleiðslupartinum, sæð í mun til avkastkrav og virðisrøkt av ognunum hjá framleiðslupartinum.

Fyri framleiðslupartin merkir hetta, at hesin skal hava allan sín kostnað rindaðan, íroknað kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur. Harumframt miðar framleiðsluparturin eftir at hava eitt yvirskot svarandi til umleið 5% av primoeginpeninginum.

Roknaða kravið til vinningin í 2025 er 45,8 mió. kr. móti 45,3 mió. kr. í 2024, svarandi til 5,0% av primoeginpeninginum hjá framleiðslupartinum. 5% í vinningi metur Sev er eitt rímiligt avkast í løtuni í mun til inflatión og aðrar íløgumøguleikar. Samlaða úrslitið fyri framleiðslupartin gjørdist eitt hall á 17,5 mió. kr.

Sambært Elveitingarlógini skal virksemið hjá Sev fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støðið í kravinum til eginfígging. Í sambandi við, at íløgurnar stavandi frá visión 2030 verða gjørdar fyrr enn áður ætlað, kann tað gerast neyðugt at hækka kravið upp á 25% eginfígging.

1. Nettosøla

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
kWt gjald o.a.	765.512	728.864
Fast gjald	23.952	22.312
Íbinding	29.004	18.141
Ómaksgjøld, áminning, onnur søla og javning til kWt-sølu	-1.867	945
Tilsamans	**816.601**	**770.262**

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggjast við lántøku. Sev hevur upprunaliga mett, at ein eginfígging upp á 25% er nøktandi, og hevur í roknskapunum fyri 2016-2024 tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin. Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støðið í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin. Hetta er grundað á at felagið higartil hevur havt ein høgan eginpeningspart. So hvørt sum hesin lækkar, verður neyðugt at hækka kravið til eginfígging, frá 25% til 40%, sum er innanhýsis eginpeningskravið til eginpeningspartin. Kravið til eginpeningspartin sambært lániavtalum felagsins er 35%.

Markið skal síggjast í mun til íløgurnar á fíggjarætlanini fyri eitt rullandi 5 ára tíðarskeið. Í fíggjarætlanini fyri 2025 sæst, at íløgurnar fyri 2025-2029 í framleiðslupartinum eru 1.960 mió. kr. Hetta svarar til 392 mió. kr. árliga í miðal. Eginfíggingarparturin fyri 2025 er soleiðis ætlaður til 98 mió. kr.

Fyri netpartin er talan um íløgur fyri 1.543 mió. kr., og er eginfíggingarparturin samsvarandi ætlaður til 77 mió. kr. fyri 2025. Tað er umráðandi, at eginfíggingin er á einum nøktandi støði, og hetta kann bert gerast við avlopi á rakstrinum.

Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstri minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið upp á 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur, netparturin hevur, umframt eina eginfígging upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin.

Býti av yvirskotinum millum framleiðslupartin og netpartin árini frammanundan hevur tikið støðið í, at tilluta framleiðslupartinum eitt úrslit svarandi til, at allur kostnaður er rindaður, íroknað kostnað fyri netumsitingina og netábyrgdina. Harumframt 5% vinning av primoeginpeninginum.

Frameftir verður neyðugt at økja inntøkurnar hjá framleiðslupartinum í mun til netpartin soleiðis, at hesar samsvara við øktu skuldarbyrðuna hjá framleiðslupartinum, sum væntandi kemur av útbyggingum av framleiðsluverkum.

Um samlaða úrslitið fyri samtakið var størri, var hesin parturin av úrslitinum fluttur til netpartin. Hetta er broytt í 2016 við, at tað nú er netparturin, sum hevur eitt tillagað úrslit og ikki framleiðsluparturin.

Notur 2-4

2. Orkukeyp eftir orkukeldu

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
Vindur	48.618	52.223
Biogass	9.150	10.365
Sólorka	431	506
Sjóvarfall	0	0
Tilsamans	**58.199**	**63.094**

3. Oljuútreiðslur

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
Gassolja	52	2
Tilsamans	**52**	**2**

4. Tilfars- og tænastuveitingar

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
Kaðalar og linjur	3.302	5.344
Tangar og umhvørvi	130	131
El og tøkni	0	15
Bygningar og lendi	3.398	2.913
Aðalfundur og nevnd	283	586
Kanning og ráðgeving	1.040	3.602
Kunningartøkni	13.789	12.870
Leiðsla og skrivstovuhald	1.259	1.366
Tap upp á skuldarar	-7	266
Aðrar rakstrarútreiðslur	7.357	6.652
Aðrar fyrisitingarútreiðslur	11.757	10.797
Tilsamans	**42.310**	**44.543**

Notur 5-7

5. Starvsfólkaútreiðslur

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
Lønir	50.641	50.383
Pensjónir	8.996	8.283
Almenn gjøld	3.290	3.064
Tilsamans	**62.928**	**61.731**
Ársverk	**125**	**124**

6. Fíggjarútreiðslur

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
Rentuinntøkur lán til dótturfeløg	-2.169	-2.388
Rentur, lán og bankaskuld	35.050	35.135
Stovningarkostnaðir, provisiónir	3.796	5.041
Órealiseraður kursvinningur ella -tap	-54.524	21.028
Órealiserað javning á avleidd amboð	63.879	-25.644
Annar rentukostnaður	4.675	-2.792
Tilsamans	**50.706**	**30.380**

7. Skattur av ársúrsliti

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
Broyting í útsettum skatti	-10.268	-14.312
Skattur í árinum sambært rakstrarroknskapi	**-10.268**	**-14.312**
Avsett til útsettan skatt 01.01	-69.368	-48.840
Broyting í útsettum skatti í rakstrarroknskapi	-10.268	-14.312
Broyting í útsettum skatti avleidd amboð beinleiðis í eginogn	15.125	-6.216
Avsett til útsettan skatt 31.12	**-64.511**	**-69.368**

Nota 8

8. Materiell støðisogn

Upphæddir í t. DKK	Býtisvirkir	Bygningar	Rakstrargøgn	Tils. 2025	2024
Útveganarvirði primo	1.880.124	162.651	287.388	2.330.163	2.221.488
Tilgongd í árinum	89.545	9.417	25.823	124.785	110.170
Frágongd í árinum	0	0	-3.260	-3.260	-1.495
Útveganarvirði ultimo	**1.969.670**	**172.068**	**309.951**	**2.451.688**	**2.330.163**
Av- og niðurskriving primo	-767.538	-52.920	-229.512	-1.049.970	-983.243
Avskrivingar í árinum	-51.553	-4.929	-22.706	-79.188	-68.223
Afturførdar avskrivingar	0	0	3.260	3.260	1.495
Av- og niðurskriving ultimo	**-819.092**	**-57.849**	**-248.958**	**-1.125.898**	**-1.049.970**
Roknskaparligt virði ultimo	**1.150.578**	**114.219**	**60.993**	**1.325.790**	**1.280.193**
Roknskaparligt virði ultimo 2024	1.112.586	109.731	57.876	1.280.193	
Arbeiði í gerð					
Arbeiði í gerð primo	186.345	20.863	10.139	217.347	120.256
Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum	249.990	7.176	10.005	267.171	187.422
Liðug arbeiði førd til avskrivingar	-72.355	-5.086	-4.512	-81.953	-90.331
Arbeiði í gerð ultimo	**363.980**	**22.953**	**15.631**	**402.564**	**217.347**
Arbeiði í gerð ultimo 2024	186.345	20.863	10.139	217.347	
Støðisogn ultimo	**1.514.558**	**137.171**	**76.624**	**1.728.354**	**1.497.540**
Støðisogn ultimo 2024	1.298.931	130.594	68.014	1.497.540	

Notur 9-10

9. Kapitalpartar í atknýttum virkjum

Upphæddir í t. DKK	31.12.25	31.12.24
Útveganarvirði primo	47.000	47.000
Útveganarvirði ultimo	**47.000**	**47.000**
Úrslit atknýtt virki primo	-8.405	1.935
Úrslit atknýtt virki í árinum	-39.133	-8.567
Javning avleidd fíggjarlig amboð	161	-1.773
Úrslit atknýtt virki ultimo	-47.377	-8.405
Bókað virði ultimo	**-377**	**38.595**

Atknýtt virki:

Upphæddir í t. DKK	Ognarpartur	Eginogn	Ársúrslit	Innroknað virði
P/F Vindfelagið í Húsahaga	100%	-29.351	-38.837	-29.351
P/F Vindfelagið í Neshaga og Porkeri	100%	28.974	-296	28.974

10. Kapitalpartar í assosieraðum virki

Upphæddir í t. DKK	31.12.25	31.12.24
Útveganarvirði primo	17.750	17.750
Útveganarvirði ultimo	**17.750**	**17.750**
Úrslit assosierað virki primo	22.628	23.599
Javning flutt úrslit undanfarin ár	0	0
Úrslit assosierað virki í árinum	1.864	-971
Úrslit assosierað virki ultimo	24.493	22.628
Bókað virði ultimo	**42.243**	**40.378**

Assosierað virki:

Upphæddir í t. DKK	Ognarpartur	Eginogn	Ársúrslit	Innroknað virði
P/F Fjarhitafelagið, Tórshavn	50%	84.485	1.864	42.243

Á statusdegnum fyriliggja tølini hjá P/F Fjarhitafelagnum fyri 2025 ikki - upplýstu tølini eru fyri 2024.

Notur 11-13

11. Lán veitt dótturfeløgum

Upphæddir í t. DKK	Áramál	Høvuðsstólur	Salda 31.12.25	Avdráttur komandi ár	Salda um 5 ár
P/F Vindfelagið í Húsahaga *	12 ár	75.000	20.796	6.750	0
P/F Vindfelagið í Neshaga og Porkeri	10 ár	28.175	3.128	3.128	0
P/F Vindfelagið í Neshaga og Porkeri	18 ár	53.400	38.567	2.967	23.733
Tilsamans		**156.575**	**62.491**	**12.845**	**23.733**

* Avsett móti tapi eru 20,8 mió. kr.

12. Avleidd fíggjarlig amboð

Upphæddir í t. DKK	Ogn 31.12.25	Skuld 31.12.25	Samlað 31.12.25	31.12.24
Prístrygging olja	0	-20.421	-20.421	3.037
Prístrygging gjaldoyra	0	-58.135	-58.135	30.384
Rentutrygging	66.689	-4.657	62.032	34.081
Tilsamans	**66.689**	**-83.213**	**-16.524**	**67.502**

Avleidd fíggjarlig amboð eru nýtt at tryggja rentugjaldingar og gjaldoyrakurs á lánum, umframt prísstøði og gjaldoyrakurs á oljukeypi. Virðini í notuni omanfyri koma fram sum munurin millum amboðini á statusdegnum í mun til tað roknaða framtíðarvirði.

13. Vøru- og tænastuáogn

Upphæddir í t. DKK	31.12.25	31.12.24
Elskuldarar	172.897	165.997
Aðrir skuldarar	4.323	20.200
Niðurskrivað upp á áogn	-4.768	-4.825
Tilsamans	**172.452**	**181.373**

Nota 14

14. Eginogn

Upphæddir í t. DKK	Innskot	Grunnur til avleidd fíggjaramboð	Grunnur til uppskriving innaravirðis-háttur	Flutt úrslit	Tilsamans
Eginognaruppgerð 01.01.24 - 31.12.24					
Salda 01.01.24	4.140	-9.257	25.534	653.388	673.806
Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð	0	3.647	-1.773	1.773	3.647
Skattur av eginognarpostum	0	-6.216	0	0	-6.216
Úrslit í dótturfeløgum	0	0	-8.567	8.567	0
Flutt grunn innanvirðishátt til flutt úrslit	0	0	-971	971	0
Ársúrslit	0	0	0	22.520	22.520
Salda 31.12.24	**4.140**	**-11.826**	**14.224**	**687.219**	**693.757**
Eginognaruppgerð 01.01.25 - 31.12.25					
Salda 01.01.25	4.140	-11.826	14.224	687.219	693.757
Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð	0	-19.986	161	-161	-19.986
Skattur av eginognarpostum	0	15.125	0	0	15.125
Úrslit í dótturfeløgum	0	0	-14.385	14.385	0
Flutt grunn innanvirðishátt til flutt úrslit	0	0	0	0	0
Ársúrslit	0	0	0	-14.674	-14.674
Salda 31.12.25	**4.140**	**-16.688**	**0**	**686.768**	**674.220**

Notur 15-16

15. Skyldur

Upphæddir í t. DKK	Skyldug renta	Avdráttur fyrsta árið	Restskuld eftir 5 ár	Skuld tilsamans 31.12.25	Skuld tilsamans 31.12.24
Skuld til fíggjarstovnar	3.784	295.858	761.189	1.256.675	1.256.675
Tilsamans	**3.784**	**295.858**	**761.189**	**1.256.675**	**1.256.675**

Lániavtalan frá 2016 fellur til gjaldingar innan miðal 1,4 ár. Lániavtalan frá 2022 fellur til gjaldingar innan í miðal 4,8 ár. Samanumtikið fella lániavtalurnar til gjaldingar innan miðal 4,3 ár.

16. Netúrslit á økir

Upphæddir í t. DKK	Inntøkur	Olja	Tilfar	Lønir	Avskriving	Rentur	Skattur	Tilsaman
Koblingarstøðir	-3.347	-22	-2.667	0	-23.002	-249	0	-29.287
Býtisvirkir	-3.924	0	-11.098	-21.646	-35.590	-11	0	-72.267
Innlegging	7.639	0	-4.725	-11.211	-10.793	-7	0	-19.097
Verkfrøði	100	0	-1.008	-3.542	-1.595	0	0	-6.045
Tøkni	113	0	-668	-3.666	-337	0	0	-4.557
Net uttan fyrisiting	**581**	**-22**	**-20.165**	**-40.064**	**-71.317**	**-268**	**0**	**-131.254**
Fyrisiting	267.465	-30	-22.146	-22.864	-7.872	-87.707	-10.268	116.579
Netúrslit	**268.046**	**-52**	**-42.310**	**-62.928**	**-79.188**	**-87.975**	**-10.268**	**-14.674**

Nota 17

17. Netyvirlit

	Fugloy	Svínoy	Viðoy	Borðoy	Kunoy	Kalsoy	Eysturoy	Streymoy	Vágoy	Mykines	Nólsoy	Koltur	Hestoy	Sandoy	Skúvoy	Stóra Dímun	Suðuroy	Til saman
Transformarastøðir, tal																		
6 kV	1			1														2
10 kV		1	8	50	3	8		102			1			22			55	250
20 kV				3			152	131	44				1	10			17	358
60 kV				2			4	8										14
Til saman	**1**	**1**	**8**	**56**	**3**	**8**	**156**	**126**	**44**		**1**		**1**	**32**			**17**	**624**
Transformarar, tal																		
6 kV	2			2				1										5
10 kV		1	13	69	3	8		128			1			24			83	330
20 kV				4			206	165	67				1	13			24	480
60 kV				3			8	22										33
Til saman	**2**	**1**	**13**	**78**	**3**	**8**	**214**	**316**	**67**		**1**		**1**	**37**			**107**	**848**
Linjur, longd km																		
60 kV				1,1			32,4	38,4										71,8
20 kV							31,2	40,8	0,6								9,6	82,2
10 kV		3,1	6,8	1,3	3,0	0,3											7,8	22,3
6 kV	2,2			6,2														8,4
Til saman	**2,2**	**3,1**	**6,8**	**8,6**	**3,0**	**0,3**	**63,6**	**79,2**	**0,6**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**0,0**	**17,4**	**184,7**

Nota 17, framhald

17. Netyvirlit

	Fugloy	Svínoy	Viðoy	Borðoy	Kunoy	Kalsoy	Eysturoy	Streymoy	Vágoy	Mykines	Nólsoy	Koltur	Hestoy	Sandoy	Skúvoy	Stóra Dímun	Suðuroy	Til saman
Kaðalar, longd km																		
60 kV				20,7			42,4	101,8						7,8			11,3	184,1
20 kV				9,9			264,9	264,9	60,5				0,6	25,8			67,7	694,3
10 kV		0,6	23,6	71,5	6,3	17,9		127,5			1,6			49,6			88,0	386,6
6 kV	0,2							3,4	3,3									6,9
0,4 kV	1,0	4,3	12,0	70,6	4,1	3,9	235,3	345,7	73,9	0,5	3,7	0,4	0,9	35,3	0,9	0,1	114,9	907,6
Til saman	**1,2**	**4,9**	**35,6**	**172,8**	**10,4**	**21,8**	**542,6**	**843,3**	**137,7**	**0,5**	**5,3**	**0,4**	**1,5**	**118,5**	**0,9**	**0,1**	**281,9**	**2.179,4**
Kaðalskáp, tal																		
0,4 kV kaðalskáp	**15**	**26**	**87**	**548**	**36**	**35**	**1.727**	**2.596**	**580**	**7**	**41**		**10**	**247**	**11**	**1**	**917**	**6.884**
Málarar, tal																		
Fjaravlisnir	64	86	358	3.293	111	146	7.285	5.092	2.108	61	202	4	47	1.022	54	6	3.382	33.321
Ikki fjaravlisnir	0	0	0	4	0	0	0	11	0	0	0	0	0	0	0	0	7	22
Til saman	**64**	**86**	**358**	**3.297**	**111**	**146**	**7.285**	**15.103**	**2.108**	**61**	**202**	**4**	**47**	**1.022**	**54**	**6**	**3.389**	**33.343**
Broyting 2025	0	0	12	66	2	2	249	522	53	1	7	0	0	31	1	0	70	1.016

Notur 18-20

18. Veðsetingar og aðrar skyldur

Víst verður til ársfrásøgnina hjá Elfelagnum Sev, har veðsetingar og aðrar møguligar skyldur framganga.

19. Reguleringar

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
Úrslit dóttur- og assosieraði feløg	37.269	9.538
Rentukostnaðir og líknandi kostnaðir	41.351	32.020
Órealiseraðir rentukostnaðir	9.355	-1.640
Avskrivingar	79.188	68.223
Skattur	10.268	14.312
Tilsamans	**177.431**	**122.453**

20. Útgreining støðisogn býtisvirkir

Upphæddir í t. DKK	2025	2024
Koblingarstøðir	507.252	497.324
Býtisvirkir	643.326	615.262
Tilsamans	**1.150.578**	**1.112.586**

Sev
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
www.sev.fo
sev@sev.fo

Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538